## Konsert í Søldarfirði

Tónleikur: Mikukvøldið klokkan 20.00 verður konsert við Nes Sóknar Musikkfelag í skúlanum í Søldarfirði. Konsertin er í sambandi við, at hornorkestrið fer á konsertferð í London frá 23. juli til 30. juli. Vanligt er, at hornorkestur taka frí frá tónleikinum um summarið, men soleiðis hevur ikki verið hjá hornorkestrinum á Skálafjørðinum. Tað hevur verið vant dúgliga seinastu mánaðirnar fyri, at túrurin til London skal eydnast væl. Á konsertini mikukvøldið verður møguleiki at hoyra sangirnar, Nes Sóknar Musikkfelag fer at spæla fyri onglendingum á túrinum. Skráin er sett saman av fleiri kendum løgum, so sum Beauty and the Beast, Aladdin og mongum øðrum. Hornorkestrið er undir leiðslu av Kenneth Jones.




## Kópakonan sum bók og plakát

Fyrr í ár gav Postverk Føroya út smáarkið Kópakonan, sum Edward Fuglø hevur teknað. Nú er eisini ein lítil bók givin út við sjálvari søgnini um kópakonuna í Mikladali. Bókin er myndprýtt við tekningunum úr frímerkjaarkinum. Bókin fæst á fimm málum: føroyskum, donskum, enskum, týskum og fronskum og er til sølu á Postverki Føroya fyri 49,- kr. Hon fæst eisini á Kunningarstovuni í Havn. Ein plakát við tekningum av kópakonuni er eisini givin út. Støddin er 70 x 50 cm og plakátin kann vendast. Tað vil siga, at hon er prentað á báðum síðum. Onnur síðan hevur hvíta bakgrund og hin brúna. Plakátin kostar 95,- kr.

# Húskallar gera comeback



*Hesir báðir verða at síggja og hoyra á Summarfestivalinum*

*Mynd: Sunva Ey. Lassen*

**Føroya størsti kultbólkur fer at spæla á Summarfestivalinum í august. Originalarnir úr Leirvík fara at syngja um Hans Ansgar, Riu og Knarvakotið**

SUMMARFESTIVALUR
*Tíðindaskriv*

Eittans kassettuband og bert seks konsertir á sumri í 1991 gjørdust grundarlagið undir fólkakæru sangunum um gerandishetjurnar Hans Ansgar, Riu, Beiggjar og svangar bøndur, sum framvegis ljóða í føroyska luftrúminum.

Húskallar, við dugnaligari manning úr bæði bygd og býi, vóru óvanligir, spontanir og dugdu at sniðgeva varandi føroyskar poppsangir, sum flestu fólk í dag kennast við. Leygarkvøldið 4. august fer fjølmenti bólkurin við avgerandi íkasti úr Leirvík á høvuðspallin á Summarfestivalinum í Klaksvík.

Bólkurin Húskallar spretti úr gátuføra "Fjósinum" í Leirvík og spjaddi seg miðvíst til tónleikaumhvørvið í Havn fyrst í nítiárunum. Verkætlanin var úrslit av hollum føroyskum sangsmíði og impulsivum ánarum av upptøkuhølunum LT Studio.

Herluf Sørensen og Kári Poulsen vóru í hesum høpi millum ídnastu stuðlar hjá bólkinum.

Originalarnir úr Leirvík, Kaj Johannesen og Jákup Alberg Eliasen, vóru millum teir, ið høvdu feskt og óbrúkt sangtilfar liggjandi, og bæði tónleikarar og onnur áhugað syrgdu skjótt fyri at útvega stóru manningini høvið at festa sangirnar á band. Og soleiðis bleiv. Á útgávuni, sum verkætlanin við flestu av landsins fremstu tónleikarum í hópinum, sendi á marknaðin á sumri í 1991, er ein snøgt skorin sangskattur, sum enn í dag ljóðar í útvarpslurtum um landið. Skemt og álvara mynda saman við stórum parti av manningini í Plúmm, umframt einum hópi av navnframum einstaklingum eina tónleikaútgávu, sum klárar at samantvinna eitt stórt úrval av stíleyðkennum; bygdapoppur við lættbeintum stevi stendur lið um lið við fastan og smidliga synkoperaðan funkpopp við ramligum málsligum innihaldi.

Sangirnir snúgva seg um eitt nú ferðslumentan og dirvi mótvegis máttloysi.

Bóndin Hungrar kann, sambært navnframum húskalli, bert skiljast "um ein vendir áherðsluni í tekstinum á høvdið".

### Fjølment veitsla á Vágsbøi

Fyrireikararnir av Summarfestivalinum kannaðu fyrr í ár møguleikan at savna manningina, sum fyri 16 árum síðani stóð fyri einari av sermerktastu føroysku tónleikaútgávunum í nýggjari tíð. Høvið var forkunnugt, og tónleikararnir, ið mannaðu Húskallar, vóru skjótir at taka av. Við á bandinum, sum bólkurin lat frá sær fyri sekstan árum síðani vóru ikki færri enn 19 ymiskir tónleikarar. Flestu av teimum vera aftur við í summar, tá ið harðmælta og litfagra manningin "ímyrkamorreyðumtroyggjum, virkaðum úr føroyskari ull og í kolli" fer at seta ferð á árligu veitsluna, sum myndar miðbýin í Klaksvík fyrsta vikuskiftið í august mánaða.

Guitarleikararnir Leivur Thomsen, Hjalti Joensen og Eyðun Mohr Hansen sveiggja ravmagnsspakar í felag, ímeðan Hans Petur í Brekkunum og Ólavur Olsen blása horn í strategiskum støðum. Ein av landsins stinnastu rútmueindum, mannað av Rógva á Rógvu á trummum og Jón McBirnie á bass fer at halda grýtuni kókandi. Magnus Johannesen og Finnur Hansen trýsta tangentar og syngja við, og miðskeiðis í fjølmenta rokanum fara originalu húskallarnir, Kaj Johannesen og Jákup Alberg Eliasen, við ágrýtnum sangi at festa eld í krútið. Sum tiltikna rosinan í pylsuendanum kemur fortíðin á forkunnuga vitjan, og kassettubond við Húskallum í fornum búna fáast til keyps í grøna nærumhvørvinum.

Fjøldin hevur fingið boðini, og kátir Húskallar eru aftur til reiðar at tæna. Komið á Vágsbø til ársins veitslu; har verður svongd og har verður ferðsla, har vera Ria og Hans Ansgar, har vera Beiggjar og har verður ball!

Leygarkvøldið 4.august fer Føroya størsti kultbólkur at syrgja fyri ársins føroysku kultframførslu á Summarfestivalinum 2007.

## Mín fyrsta reyða orðabók

ORÐABÓK
*Tíðindaskriv*

**ENSKT:** Bókadeild Føroya Lærarafelags er longu til reiðar við spildurnýggjari orðabók til fólkaskúlan.

Saman við forlagnum Gyldendal hevur Bókadeildin latið gjørt orðabók, sum er sera væl egnað til frálæru í enskum hjá 8 til 12 ára gomlum børnum.

Orðabókin er í trimum pørtum:

Ein enskur-føroyskur orðalisti.

Ein partur um hugtøk og nøvn á ávísum evnum og lutum. Nevnast kann t.d. orð í samband við sjógv, ítrótt, føðingardag, kroppin, køkin, skúla, tíð. Umframt dømi um sagnorð, fyrisetingar og annað mangt.

Ein partur er føroyskur-enskur orðalisti.

Mín fyrsta reyða orðabók er ein spildurnýggj orðabók. Tekstin hava Dorthe Maria Buhl og Ellen Jørgensen skrivað, og Marna Jacobsen hevur týtt til føroyskt.

Í orðabókini eru fleiri enn 2600 leitorð, og hon er prýdd við stuttligum tekningum eftir kenda teknaran Jon Ranheimsæter.

Bókin er innbundin, er 187 bls., umframt at avritsørk eru í bókini til at spæla sær við orðum. Orðabókin kostar 220 kr í handlunum.

Mín fyrsta reyða orðabók er ein góð og stuttlig hjálp hjá bæði stórum og smáum, tá ið farast skal undir at læra enskt á fyrsta sinni!